# Sum sólin upp úr havinum



## Grundgevingin fyri Norðurlendsku dramatikaravirðislønini

*Stykket har ansats til at blive et familiedrama i vor tid, men udvikler sig til at være overvejende et spil, der foregår på en lukket psykiatrisk institution, og viser hovedpersonen Jóhanna mellem medpatienter på afdelingen. Her er alvor og humor en del af forfatterens styrke, så der fremstår en humoristisk og orginal scenetekst, der er overraskende og åbner vores sind.*

*Stykket er flydende og frit skrevet med meget billedsmukke og gribende monologpassager der viser, at forfatteren er en meget fin dikter med sans for det tragikomiske og med stor medmenneskelighed i sin menneskeskildring.*

*Stykket rummer ligeledes en stor portion færøsk selvkritik og skildring af selvhad, og forfatteren viger ikke for også at anlægge en postkolonial kritik. Sider af indvandrer og flygtningproblematikken strejfes. Men centralt står Jóhannafiguren med hendes uforløste kærlighed. Menneskevarmd, gribende og humoristisk skildret.*

Guðjón Pedersen, formaður í Norðurlendsku Teaturuniónini

*Guðjón Pedersen, formaður í Norðurlendsku Teaturuniónini handaði mikukvøldið, Jóanesi Nielsen, rithøvunda, Norðurlendsku dramatikaravirðislønina*

*Mynd Finnur Justinussen*

**VIRÐISLØN**
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg visti ikki, at henda virðislønin var til, so tá hon kemur sum sólin upp úr havinum, so kann ein siga, at eg varð yvirraskaður, segði Jóanes Nielsen eftir setanina og handanina av virðislønini.

Hann sigur eisini, at tað liggur ein serlig fáfongd í at hava fingið hesa virðislønina.

– Tá ein hevur fingist við at skriva, so er ein slík virðisløn stimulerandi. Og eg haldi eisini, at tað hevur eisini eitt sindur við fáfongd at gera, tá leikurin nú verður uppsettur í øllum Norðanlondum, sigur rithøvundurin.

Jóanes Nielsen fortelur eisini, at tá hann hevði sæð leikin, helt hann ikki, at hann smæddist burtur ímillum hinar.

– Eg haldi ikki, at tað var so løgið, at hann varð innstillaður, sigur Jóanes Nielsen at enda í stuttu samrøðuni.

Ferðsluóhapp:

# Talið av skaddum tvífaldað

**Talið av fólki, sum fekk skaða í ferðsluni í fjør, er nærum tvífaldað samanborið við árið 2000**



*Talið av fólki, sum fekk skaða í ferðsluni í Føroyum, øktist úr 35 upp í 63 frá 2000 til 2001. Talið av deyðum í ferðsluni øktist eisini. Fýra fólk lótu lív í fjør og tvey árið fyri*

**FERÐSLUÓHAPP**
*Stefan í Skorini*

63 fólk fingu skaða í ferðsluóhappum í fjør. Hetta er ein stórur vøkstur samanborið við árið fyri. Tá fingu 35 fólk skaða í ferðsluni. Hesin vøksturin hevur kanska samband við, at talið av ferðsluóhappum eisini er økt. Í 2001 fekk løgreglan fráboðan um 1344 ferðsluóhapp. Talið av óhappum í 2000 var 1219.

Talið av skaddum í ferðluni var serstakliga lágt í 2000, tá bara 35 fingu skaða. Árið fyri var talið 62, í 1998 fingu 83 skaða í ferðsluni og í 1997 var hetta talið 53.

Talið av teimum, sum doyðu í ferðsluni í Føroyum, er eisini økt. Í fjør lótu fýra fólk lív í ferðsluvanlukkum. Í 2000 var talið av deyðum í ferðsluni tvey.

Um hugt verður longur aftur í hagtølini sæst, at í 1999 lótu átta fólk lív í ferðsluni, í 1998 lat ein persónur lív og í 1997 lótu sjey fólk lív í ferðsluni.

### Færri ákærd

Talið av teimum, sum eru ákærd fyri brot á ferðslulógina var nógv lægri í fjør enn í 2000. í 2001 vórðu 1681 ákærurit skrivað fyri brot á ferðslulógina, og tá er rúsdrekkakoyring og parkeringarmál ikki tikin við. Í 2000 vóru heili 2043 fólk ákærd fyri ymisk brot á ferðslulógina.

Hagtølini vísa ikki tey stóru upplopini ella niðurgongdirnar, uttan í 1997 tí tá vóru bert 1336 fólk ákærd fyri brot á ferðslulógina. Í 1998 var talið 1663, og í 1999 vóru 1801 fólk ákærd.

156 fólk blivu ákærd fyri rúsdrekka- ella promillukoyring í farna ári. Talið av ákærdum fyri hetta brotið á ferðslulógina var 153 í 2000. Hagtølini aftureftir vísa, at tølini hava verið á leið tey somu ár um ár.

### Færri fongsulsdagar

Føroyingar hava sum heild sitið færri dagar handan rimar í fjør enn undanfarin ár. Í 2001 vórðu 2466 fongsulsdagar nýttir í arrestini í Havn. Hetta talið er sera lágt í mun til undanfarin ár.

Í ár 2000 sótu fólk 3697 dagar í fongsli, og hetta er góðar túsund dagar meira enn í 2001. Í 1999 sótu fólk 3427 dagar í fongsli, í 1998 vóru 3109 fongsulsdagar og talið var 3094 dagar í 1997.




